# neistar - 12 neistar - 12 neistar - 12 neistar - 12 neistar - 12 neistar - 12 neistar

*Tá alt kom til stykkis, gjørdist tað menninir hjá Neistanum, sum høvdu savnað sær flestu stigini í landskappingini. Hóast teir ikki hava verið eins einaráðandi gjøgnum alt kappingarárið, so lótu teir ongan iva vera eftir, men gjørdu hinvegin bart í endaspælinum, har teir vunnu allar 12 dystirnar. Niðanfyri eru stuttar lýsingar av teimum 12 leikarunum, sum leygardagin vóru við til at tryggja felagnum FM-heitið hjá monnum fyri fyrstu ferð í 22 ár. Aðrir leikarar enn hesir hava eisini verið á liðnum hetta kappingarárið, men leygardagin vóru tað so hesir 12 neistarnir, sum sigraðu á VÍF*



*Finnur Hansson, 76 mál*

Ein av leikarunum, sum kom til felagið undan hesum kappingarárinum, eftir at hann áður hevur verið í H71. Ein skjótur og tekniskt góður leikari, sum hevur møguleika til at menna seg heilt nógv



*Áki Mørk, 42 mál*

Hevur veruliga fingið sítt gjøgnumbrot hetta árið, har hann hevur roynt seg sum bæði vinstri vongur og spælskipari. Hevur í fleiri dystum átikið sær avgerandi leiklut, serliga tá Áki Olsen og Heini hava verið mansvardir



*Elmar Ósá, 48 mál*

Er kanska mest kendur fyri avrik síni í svimjihylinum, men hevur í ár prógvað, at hann er ein fínur hondbóltsleikari. Serliga er tað kropsstyrkin og skjótleikin, sum eru styrkirnar hjá Elmari.



*Heini Joensen, 189 mál*

Toppskjúttin í føroysku kappingini hetta kappingarárið hevur saman við Áka Olsen verið millum avgjørt týdningarmestu leikararnar á neistaliðnum. Vandamesta vápnið hjá liðskiparanum er so avgjørt vinstrahondin.



*Helgi Justinussen, 4 mál*

Tá hann hevur fingið møguleikan, hevur Helgi fleiri ferðir víst, at hann er ein leikari, sum roknast skal við í framtíðini. Hóast lítil í vavi, so er hann rættuliga væl fyri kropsliga, umframt at hann eisini er ein tekniskt góður leikari.



*Bogi Henriksen, 0 mál*

Hevur kanska ikki verið eins sjónligur, og hann hevur verið undanfarin ár, men saman við Peturi hevur hann so avgjørt átt sín stóra lut í meistaraskapinum, tá teir báðir í fleiri dystum hava verið tungan á vágskálini



*Jákup Sverri Kass, 16 mál*

Eftir vetrarsteðgin hevur løgtingsmaðurin verið fastur fúsur á neistaliðnum, har tað serliga hevur verið í verjupartinum at hann hevur sýnt sínar dygdir. Er ikki so sjónligur í álopspartinum, har hann ofta verður skiftur út.



*Petur Magnusson, 1 mál*

Hevur ígjøgnum árið ment seg til at vera ein av fremstu málverjunum í landinum, og setti eitt flott punktum við at taka pippið frá skjúttunum hjá VÍF í seinasta dystinum. Er eisini sera íðin í at skipa verjuspælið.



*Kári Mortensen, 84 mál*

Hevur í skjótt fleiri ár prógvað, at aldurin er eingin forðing fyri at spæla hondbólt á hægsta støðið. Er nú fluttur út á veingin at spæla, har tað serliga er í kontraálopum, at hann hevur gjørt vart við seg.



*Áki Olsen, 188 mál*

Kanska besti álopsleikarin í landinum hevur so avgjørt átt sín stóra lut í gullmerkjunum. Fyrst og fremst hevur hann eina óhugnaliga skotstyrki, men tekniskt er hann eisini sera væl fyri, og er hann við í uppspælinum til nógv mál.



*Karl Oddmar Rasmussen, 32 mál*

Er í ár fluttur av bakkinum inn á strikuna, og hevur hetta eisini merkt spæl hansara. Veikleikarnir í álopspartinum vera tó uppvigaðir av styrkini í verjuspælinum, har hann hevur verið ein sera týðandi partur av neistaliðnum



*Ræni Slættanes, 10 mál*

Hevur ikki leikt so nógv á besta liðnum hetta kappingarárið, men í løtum hevur Ræni prógvað, at hann í framtíðini fer at seta seg á sessin sum fremsti strikuspælarin í felagnum, men enn væntar honum nakrar fleiri royndir